# Oljufelag størsti kundi hjá Føroya Tele

**Oljuleitingin á landgrunninum hevur longu stóran týdning fyri fleiri føroyskar fyritøkur, eitt nú Føroya Tele. Ein mánað í vetur hevur eitt av oljufeløgunum verið størsti kundi hjá felagnum.**

OLJA OG INNTØKUR
*Jan Müller*




*Føroya Tele hevur roynt at fylgja við oljutilgongdini við tí fyri eygað at verða tilreiðar at møta stóru avbjóðingunum frá hesi vinnu, ið setir nettupp stór krøv til samskifti. Her stjórin á Føroya Tele, Andras Róin (uttast vinstrumegin) á kanningarferð hjá Norsk Hydro í Noregi.*

*Mynd Jan Müller*

Virksemið, sum hevur tikið seg upp í sambandi við oljuleitingina, hevur fingið stóran týdning fyri fleiri føroyskar fyritøkur. Ein teirra er Føroya Tele. Oljuleitingin á landgrunninum er orsøkin til, at oljufeløg eru vorðin stórir kundar hjá Føroya Tele. Ein einstakan mánað í vetur hevur t.d. BP verið størsti einstaki kundin hjá Føroya Tele

Andras Róin, stjóri í Føroya Tele, vil ikki gera viðmerkingar til einstakar kundar men váttar, at oljufeløg hava verið sera góðir kundar hesar seinastu mánaðirnar. Talan er um bæði BP, Statoil, Hess og Agip, sum standa fyri boringunum í 1. leitiumfari.

-Tað er sera týdningarmikið fyri okkum sum fyritøka í menning, at vit fáa kundar, ið eru meira krevjandi og fáa okkum at møta nýggjum avbjóðingum. Sjálvur heldur Andras Róin, at teir hava verið førir fyri at møta hesum nýggja eftirspurninginum. Teir hava so eisini roynt at menna seg til tær nýggju avbjóðingarnar við eitt nú at vera við á oljuráðstevnum. Tað snýr seg at gera seg út til at møta nýggju oljukundunum, sum hava serstøk ynski.

Tað er neyvan heldur nakað dulsmál, at ein stórur partur av fartelefoninntøkunum stavar frá oljuvirkseminum, tvs. inntøkur frá eitt nú telefonum, sum eru skrásettar í londum við oljuvinnu sum eitt nú Bretlandi og Noregi.

Andras Róin er sera fegin um avbjóðingina teir fáa frá nýggju oljukundunum, tí teir henda vegin møta nýggj kundakrøv.



*Andras Róin, stjóri í Føroya Tele her umborð á oljutyrlu á veg út á pall í Norðsjónum.*

*Mynd Jan Müller*

## Nýggjan kaðal

Føroya Tele arbeiðir eisini við ætlanini at útbyggja samskiftisnetið millum

Føroyar og umheimin. Ætlanin er í næstum at hava fund við øll oljufeløgini, sum eru virkin á Føroyaleiðini. Hetta hevur samband við ætlanina at leggja ein nýggjan kaðal millum Ísland, Føroyar og bretska meginlandið. Arbeiðið er komið so mikið langt, at teir skulu til at finna fram til júst, hvar kaðalin skal ganga.

Tað hevur verið tosað um, at oljufeløgini, sum arbeiða vestan fyri Hetland, vilja hava fibrar lagdar uppá pallarnar. Her hevur serstakliga verið tosað við BP, sum stendur á odda fyri fleiri av oljukeldunum vestan fyri Hetland. Oljufeløgini vilja sera fegin minka um manningar sínar á oljupallunum og so fjarstýra meira frá landi av. Tað krevur fibrar. Tað er ikki nokk við radiolinki ella fylgisveini.

Ein kaðal úr Føroyum kann tí koma oljuvinnuni, sum arbeiðir vestan fyri Hetland sera væl við, og kemur tað eisini væl við hjá Føroya Tele og íslendingum, um oljufeløgini vilja vera við til at gera hesa íløguna. BP hevur arbeitt við eini ætlan at fáa fibrar umborð á bæði oljufeltini Schiehallion og Foinaven.

## Bíligari

Annars hevur kreppan í fjarskiftisheiminum gjørt, at verkætlanin hjá Føroya Tele og íslendingum at leggja kaðal millum londini og inn á meginlandið er vorðin munandi bíligari. Prísurin hevur verið 500 til 600 mill. kr. men nú er hann niðri á góðum 400 mill. kr.

Endaliga modellið er ikki klárt men lagt er upp til, at føroyingar gjalda ein fimting og íslendingar fýra fimtingar av verkætlanini. Koma oljufeløgini inn, so koma tey eisini at bera ein part av íløguni. Ætlanin er at fáa alt uppá pláss innan mars næsta ár.

Verður framleiðsla á føroyskum øki so verður eisini tørvur á betri telesamskifti. Tó er hesin tørvurin longu veruligur, tí verandi kaðalin nøktar ikki tørvin einsamallur. Tað ber ikki til at veita eykaorku, um verandi kaðalin svíkur.



*Samskifti hevur alstóran týdning fyri oljuleiðinar á Atlantsmótinum. Her lesur stjórin hjá BP í Føroyum, Hjarnar Djurhuus Internetsosialin umborð á oljuskipinum Petrojarl Foinaven, sum liggur hinumegin markið í bretskum øki.*

*Mynd Jonhard Hammer.*



# Útbjóðingin afturkallað




*Poul Johannes Poulsen, bussførari úr Sumba, sigur, at teir, sum koyra hjá Bygdaleiðum í Suðuroy, fara undir ongum umstøðum at góðtaka ein 10 mánaða fyribilssáttmála, meðan boðið verður út av nýggjum*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Ymisk ivasom viðurskifti viðvíkjandi koyringini hjá Bygdaleiðum í Suðuroy hava gjørt, at Strandfaraskip Landsins hava kallað útbjóðingina aftur**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Koyringin hjá Bygdaleiðum í Suðuroy skal bjóðast út av nýggjum. Strandfaraskip Landsins hava gjørt av, at taka útbjóðingina aftur og hava tikið upp samráðingar við verandi bussførarar um at halda fram við koyringini sum higartil. Tað vilja bussførararnir ikki. Teir krevja ávísar ábøtur fyri at halda fram.

Støðan hjá Bygdaleiðum í Suðuroy er so ógreið, at neyðugt verður at taka alla koyringina upp til nýggja viðgerð og bjóða út heilt av nýggjum, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari á Strandfaraskipum Landsins.

Tað kemst millum annað av, at tímatalið, sum givið varð upp í upprunaliga útbjóðingartilfarinum, heldur ikki. Ógreiða er eisini um ferðaætlanina, eins og ógreiða er um skúlabarnakoyringina, sigur hann í brævi, sum sent er teimum, ið hava boðið upp á koyringina í Suðuroy.

## Krevja ábøtur

Ein teirra, sum í dag koyrir buss í Suðuroy, er Poul Johannes Poulsen í Sumba. Hann sigur við Sosialin, at teir, sum nú hava koyringina, vórðu boðsendir á fund við Strandferðsluna sunnudagin. Fundurin varð hildin umborð á Smyrli, sum lá á Drelnesi. Har fingu teir at vita, at útbjóðingin varð afturtikin, eins og teir vóðru bidnir um at halda fram at koyra undir verandi treytum.

Strandferðslan ynskti, at teir longdu verandi avtalur við 10 mánaðum. Men tað er púra greitt, at tað kunnu teir ikki ganga við til, sigur Poul Johannes Poulsen.

– Vit tosa ikki um nakað, sum er styttri enn í hvussu er eitt ár, sigur hann. Eisini er okkurt annað, teir vilja hava bøtt um, áðrenn teir gera nakra nýggja avtalu um koyringina, sigur hann.

Tá vit tosaðu við Poul Johannes Poulsen, áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár, segði hann, at mánadagurin væntandi fór at verða avgerandi fyri, hvat hendi.

– Nú hava vit givið tol so mikið leingi, at vit klára saktans ein dag ella tveir afturat, tók hann til.

## Riggað av

Men tað verður ikki bara sum at siga tað at koma aftur um aftur nú, heldur Poul Johannes Poulsen.

Væl hava teir í sáttmála tryggjað sær, at teir sleppa av við bussarnar, um teir ikki sleppa at halda fram við koyringini.

Eitt annað er, at teir nú, bara einar 14 dagar áðrenn verandi avtalur ganga út, skulu fara at finna nýtt fólk at koyra.

– Tí støðan er tann, at fleiri hava longu riggað av. Tað ger støðuna heldur trupla, at hjálparfólk, vit hava havt, longu hava fingið sær annað arbeiði eftir nýggjár. So tað kann standast onkur smávegis trupulleiki av at finna nýtt fólk soleiðis í eini handavending, sigur hann.

## Svara skjótt

Poul Johannes Poulsen sigur, at tá teir fáa eitt útspæl frá Strandferðsluni, fara teir at svara beinanveg. Tað skal ikki taka meira einn einar tveir tíma,r heldur hann, tí teir vita púra greitt, hvat teir vilja hava.

Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari, væntaði í gjár, at uppleggið frá Strandferðsluni kom annaðhvørt í gjár ella í dag.

Eitt annað mál er, sigur Poul Johannes Poulsen, bussførari, at teir, sum fáa koyringina, skulu eisini fáa sær nýggjar bussar.

Í upprunaliga útbjóðingartilfarinum stendur, at bussarnir mugu í mesta lagi vera 10 ára gamlir. Hesar treytir lúka bara tveir busar í Suðuroy, sum eru ávikavist tvey og fýra ára gamlir. Hinir liggja um 14-16 ár, sigur hann.

Og tað er ikki bara sum at siga tað at fáa ein buss. Byggitíðin er einar sjey mánaðar, umframt at bíðitíð helst er at sleppa fram at at byggja.

## Tilboðini

Tilboðini, sum komu inn upp á koyringina í Suðuroy, vóru trý í tali. Tað lægsta var upp á 4.950.000,- krónur. Tað mittasta upp á 5.879.751,- krónur, og tað hægsta upp á 8,244.043,80 krónur.

Nú so stórar broytingar eru komnar í orsakað av millum øðrum tímatali og skúlabarnakoyring, kann væntast, at tey nýggju tilboðini, sum fara at koma, verða væl hægri.

Samráðst hevur verið við tað felagið, sum hevði lægsta tilboðið. Men tær samráðingarnar eru nú hildnar uppat, sum vera man.

Tann, sum hevði lægsta tilboðið, tá boðið varð út, var felagið S.P. Leiðir við Mikkjali Paula Johansen í Trongisvági.

Hann hevur onga viðmerking til, um hann møguliga fer at leggja nakað endurgjaldskrav ella annað krav móti Strandferðsluni, eftir at hava havt samráðingar um koyringina, sum nú kortini ikki verður til nakað.

